# Hanstholm – týdningarmesta fiskivinnuhavnin í Danmark



*Hanstholm Havn, sum danir rópa hana, verður millum útlendsku útbjóðararnar á vinnustevnuni FaroExpo. Virksemið, sum á ymiskan hátt er knýtt at havnini og havnalagnum, gevur í løtuni 2300 fólkum arbeiði – ikki minst í fiskivinnuni og ferðamanna-og flutningsvinnun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ein nýggj frágreiðing staðfestir við sjeytummaseymi, at havnin í Hanstholm hevur ein týdningarmiklan leiklut í Thisted kommunu og í Norðurjútlandi sum heild. Ein týðandi orsøk er siglingin hjá Master Ferries, Fjord Line og Smyril Line upp á Hanstholm**

FAROEXPO 07
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hanstholm Havn, sum danir rópa hana, verður millum útlendsku útbjóðararnar á vinnustevnuni FaroExpo.

Vit hava tí hugt at, hvat sagt verður um hesa donsku havnina, ið nógvir føroyingar kenna frá ferðunum við Norrønu. Aðrir kenna hana, tí teir hava siglt við skipum úr Hanstholm – ella hava landað og selt veiðina um fiskamarknaðin har.

## Áhugaverd kanning

Havnin í Hanstholm er fyrsta fiskivinnuhavnin í Danmark, sum hevur latið gera eina kanning og eina kortlegging av tí týdningi, sum havnin hevur fyri økið.

Samfelagsbúskaparligu útrokningarnar eru gjørdar eftir eini eini skrá, sum Danske Havn og Syddansk Universitet hava gjørt. Hetta merkir, at beinleiðis samanberingar kunnu gerast við tilsvarandi kanningar, sum gjørdar eru fyri samferðsluhavnir og komandi kanningar av fiskivinnuhavnum.

Úrslitið av kanningin av havnini í Hanstholm talar fyri seg:

- Havnin spælir nevniliga ein týðandi leiklut í búskaparligu menningini í Thisted kommunu og í Norðurjútland. Vit eru ein "erhvervsklynge", sum vit rópa tað. Men vit vistu ikki, at havnin á ymiskan hátt gevur arbeiði til heili 2300 fólk, sum kanningin prógvar.

Tað sigur havnastjórin, Hans Kjær.

## Nógvur aktivitetur

- Kanningin vísir, at framleiðsluvirðið, sum er tengt at havnini, er út við 1,9 miljardir krónur um árið, og at hetta gevur út við 770 miljónir krónur í inntøkum um árið. Tað er 12,5% av samlaða skattagrundarlagnum í allari Thisted kommunu.

Havnin í Hanstholm kundi halda 40 ára dag sín í ár, samstundis sum árið í ár hevur verið hitt besta í umsetningi í havnasøguni sum heild.

Herfyri skipaðu tey í Hanstholm eisini fyri eini havnaráðstevnu, har 117 gestir úr øllum landinum vóru við.

- Á ráðstevnuni var fokus sett á spurningin um, hvat krevst fyri at havnaskipanin í Danmark kann megna tær avbjóðinar, sum liggja fyri framman – við flutningi, fiskivinnu og arbeiðsmenning.

Havnastjórin sigur, at veksandi tal av ferðafólki og góðsi merkja, at danskar havnir – og eisini havnin í Hanstholm – hava ein størri og størri samfelagsligan týdning, tá avgerðir skulu takast um vegakerv og menning.

- Okkara havn hevur røkkið sínari støðu við, at havnin er eitt náttúrligt knattapunkt við atliti til fiskileiðirnar í Norðsjónum. Haraftrat kemur tann flutningur av ferðafólki, bilum og farmi, sum er millum Hanstholm, Noreg og Føroyar.

> *"Vit eru ein "erhvervsklynge", sum vit rópa tað. Men vit vistu ikki, at havnin á ymiskan hátt gevur arbeiði til heili 2300 fólk, sum kanningin prógvar.."*
>
> *(Havnastjórin, Hans Kjær)*

## Liggur væl fyri

Hann leggur aftrat, at orsøkin til, at norsk og føroysk feløg brúka Hansholm, er, at hetta er nærmasta havnin í Danmark av sínum slagi.

- Vit eru ógvuliga bevíst um hesar stóru fyrimunir, sum vit hava, men vit hava ikki í nóg stóran mun "brandað" okkum við teimum møguleikum, sum liggja í hesum.

Hans Kjær sigur, at ferðafólkaog bilaflutningurin um Hanstholm gjørdi stór framstig í 2006, tá Master Ferries við skjóttgangandi ferju fór at sigla millum Kristianssand og Hanstholm.

- Hesin túrur tekur minni enn tveir tímar og hevur havt 300.000 ferðandi um árið. Aftrat hesum hava vit reiðaríini, Fjord Line og Smyril Line, sum eisini sigla til ávikavist Egersund, Haugesund og Bergen – umframt Føroyar og Ísland.

Havnastjórin sigur, at tilsamans flyta hesi trý reiðaríini 530.000 ferðandi, 119.000 persónbilar og 21.000 lastbilar um Hanstholm um árið.

## Góð tænasta

- Aftrat sentralu plaseringini, sum Hanstholm hevur, ið er grundarlagið undir øllum hesum flutningi, bjóðar býurin eisini 24 tímar langa tænastu um samdøgnið, eitt nú við skiljing av fiski og umvælingum. Fiskifør kunnu soleiðis altíð fáa ta tænastu, tey hava brúk fyri.

Havnastjórin vísir á, at Hanstholm eisini hevur gjørt munandi íløgur í Hanstholm Seafood Center, har tey eisini hava heimsins nýggjastu og mest nútímans skiljiskipan til fisk – ein skipan, sum eisini lýkur krøv um sporføri og góða viðferð av fiskinum.

- Aftrat savningarstøðunum til fisk, hava vit eisini ein fiskamarknað, og allastaðni verður fiskurin goymdur undir optimalum umstøðum, sigur Hans Kjær, havnastjóri.



*Ein kend og hugnalig mynd hjá teimum, sum hava ferðast við Norrønu úr Hanstholm*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*